


# Tænarar

**Pizza 67 í Tórshavn søkir tænarar at arbeiða í skiftandi vaktum.**

**Vit ynskja at tú:**
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni

Løn sambart avtalu.

Ynskir tú at frætta meira um starvið, so er tú vælkomin at ringja 221 221 og tosað við Rúna Kruse.

## Pizza 67

# Løgtingsval 2008

Sum kunngjørt av løgmanni verður løgtingsval leygardagin 19. januar 2008.

**Valt verður soleiðis:**

1. Fólk í Havn, Mjørkadali, Norðradali og Hoyvík, á Hvítanesi og Sundi velja í ítróttarhøllini á Hálsi.

2. Fólk á Argjum velja í róðrarneystinum á Argjum.

4. Fólk í Kaldbak og Kaldbaksbotni velja í skúlanum í Kaldbak.

5. Fólk í Kollafirði velja í skótahúsinum í Kollafirði

6. Fólk í Kirkjubø, á Velbastað og í Syðradali velja í skúlanum á Velbastað

7 Fólk í Hesti og Koltri velja í bygdarstovuni í Hesti

8. Fólk í Nólsoy velja í felagshúsinum hjá Ungmannafelagnum Royndini í Nólsoy

Atkvøðugreiðslan verður frá kl. 10.00-20.00 ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Tey, sum vegna sjúku ella av øðrum orsøkum ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu boða frá á Snarskivuni, telefon 30 20 10, til dagin fyri valið.

Samstundis verður boðað frá, at valkort til løgtingsvalið verða send teimum, ið standa á vallistanum. Um veljari hevur ikki fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal sum skjótast boðast Snarskivuni frá hesum.

**Valstýrini í Tórshavnar kommunu**

**Tórshavnar kommuna**



# Raðhús í Berjabrekku 121, íbúð nr. 91

Eigaraíbúð á Berjabrekku við bergtakandi útsýni yvir býin og Nólsoyarfjørð til sølu.

Íbúðin er í tveimum hæddum, og gólvvíddin er 106,6 m² tilsamans - umframt hjall.

1. hædd: durur, baðirúm við brúsu, gongd við trappu, stova og køkur í einum.

2. hædd: gongd, 1. hjúnarrúm, 2. kømur og baðirúm við brúsu.

Íbúðin er sum nýggj. Klædningur, hurðar og termo plast vindeygu eru skift fyri stuttum.

Barnavinarligt umhvørvi. Gott bussamband.

Friðaligt og tætt til handils.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Advokatvirkið, tlf. 312171.

Ognin verður seld, um nóg høgt boð fæst.

## Advokatvirkið

Páll Nielsen, adv. Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 • Postsmoga 85 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • Fax 315874 • jus@advokatvirkid.fo
www.advokatvirkid.fo

# VALLISTAR til løgtingsvalið 2008

Sagt verður frá, at vallistar til løgtingsvalið tann 19. januar 2008 í Tórshavnar kommunu eru til skjals í Snarskivuni í Havn frá 14. til 21. desember 2007.

Kærur um skeivleikar á listanum skulu sendast Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 27. desember 2007.

**Tórshavnar kommuna**

## Til sølu



**Traðavegur 30, 435 Streymnes**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Býur** | 435 Streymnes | **Matr. nr.** | 192L |
| **Bústaður** | Traðavegur 30 | **Byggiár** | 2006/2007 |
| **Støða á grundøki** | 662 m² | **Støða á húsinum** | 80 m² |

**Veghæddin** Durur, gong, baðirúm við brúsu og wc, køkur og stova íeinum. 2 kømur.
**Loft** Høga reising óinnrættað uml. 50 m²
**Frágreiðing** Góð hugnalig føroysk sniðhús av slagnum Norðseturí besta standi, bygd í 2006/2007, við høgari reising. Húsini eru klødd við timbri, takið aluminium.
Húsini eru nýggj, klár at flyta inn í, hiti í gólvinum í durrinum, baðirúmið hevur vinylgólv við hita, annars eru vøkur eins trægólv í stovu, gong og kømrum.
Húsini liggja sera frítt og friðaligt í natúrvøkrum umhvørvi, gott útsýni oman yvir bygdina, niðan í hagan og út á fjørðin.
**Áhugaði kunnu ringja 214141**



# Jeepur til sølu

Mitshubitshi Grand Pajero 3.2 V diesel vøruvognur til sølu. 5 ár, koyrt 91.000 km.

4 píkadekk á felgum fylgja við.

Prísur: 195.000 kr. v/mvg

**Tlf. 31 77 23 / 27 05 77**

# Stuðulsstarv í Stranda skúla

Stranda skúli søkir eftir einum fólki at stuðla einum 13 ára gomlum dreingi. Hetta er eitt royndartiltak fram til 1. mars 2008 við 20 tímum um vikuna. Hildið verður tó fram, um tiltakið eydnast. Løn sambært sáttmála við pedagogfelagið.

Umsóknirnar við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi seinast 29. desember 2007

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran, Richard Johansen á telefon 232740.

**Stranda skúli,**
**Skúlavegur 7,**
**Postsmoga 60**
**490 Strendur**